# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*– Onkur í Barbarino-familjuni hevur dult sannleikan øll hesi 34 árini*

*løgreglan í New Jersey*

# Einki svar úr rúmdini



**Í átta dagar hava amerikonsku rúmdarmyndugleikarnir einki hoyrt frá Marsfarinum Global Surveyour.**

Fyri átta døgum síðani sendi NASA Mars-farinum eini boð, men hóast fleiri royndir hevur NASA ikki frætt aftur frá farinum síðani.

Global Surveyour hevur sera góð myndatól umborð og hevur longu sent NASA fleiri túsund myndir av Mars. Serfrøðingar, sum hava kannað myndirnar, siga tær vera sera áhugaverdar, tí fleiri teirra bera boð um, at vatn hevur verið á gongustjørnuni eina ferð í tíðini.

Umframt Global Surveyour eru trý onnur rúmdarfør í ringrás um Mars, men einki teirra hevur verið har so leingi sum Global Surveyour.

Í NASA vita tey ikki, hví Global Surveyour ikki letur frætta frá sær longur.

# Skuldsettur fyri morð 34 ár aftaná

**Í 1972 varð ein seks ára gamal smádrongur funnin myrdur á einum byggiplássi í New Jersey í USA. Nú er bróðurin skuldsettur fyri morðið.**



*34 ár aftaná er Joseph Barbarino skuldsettur fyri at hava myrt bróður sín.*

Joseph Barbarino var 15 ára gamal, tá seks ára gamli bróður hansara Vincent varð funnin deyður. Løgreglan staðfesti beinanvegin, at drongurin var myrdur. Feiri fólk blivu avhoyrd, teirra millum tann eldri bróðurin, men løgreglan noyddist at leggja málið til viks, og morðið bleiv umrøtt sum ein gáta.

Nú 34 ár seinni hevur løgreglan skuldsett tann 50 ára gamla bróðurin fyri morðið, skrivar The New York Times. Løgreglan heldur, at Joseph myrdi bróðurin við knívi, tí hann sýtti fyri at hava kynsligt samband við tann eldra bróðurin.

Ein talskvinna hjá løgregluni í New Jersey sigur, at onkur í familjuni hjá teimum báðum dreingjunum hevur vitað um viðurskiftini teirra millum leingi, men ikki fyrr enn nú er tað komið undan kavi. Sambært talskvinnuni vístu kanningarnar fyri 34 árum síðani, at tann yngri bróðurin hevði verið kynsliga misbrúktur.

Joseph Barbarino kann nú vænta sær lívlanga fongsulsrevsing. Man tað fer ikki at broyta gerandisdag hansara so nógv, tí síðani morðið hevur hann sitið nøgju ferðir í fongsli fyri stuldur, eldáseting og onnur brotsverk.



# Heimsins skógir veksa aftur

**Átøkini fyri at varðveita skógirnar hava virkað eftir ætlan**

Tað eru serliga amerikanarar og kinesarar, sum hava tikið stór tøk fyri at varðveita skógirnar, og nú sigur ein amerikonsk kanning, at arbeiðið hevur givið úrslit. Harafturímóti gongur tað framvegis tann øvugta vegin í stórum skógarlondum sum Brasil og Indonesia, har skógurin minkar í hvørjum.

Lærdi háskúlin Rockefeller í New York sigur, at heldur núverandi gongdin fram, verða umleið 10 prosent av øllum lendi á Jørðini skógur um góð 40 ár. Sagt verður, at skógirnir kring heimin hava sera stóran týdning fyri umhvørvið á Jørðini, tí trøini taka koldioxid, sum sambært granskarunum er ein av orsøkunum til tann veksandi hitan á Jørðini.

Amerikanska frágreiðingin sigur, at heimsins skógir eru tættari nú enn fyri 20 árum síðani, og tað verður tikið sum eitt tekin um, at arbeiðið ímóti óskipaðari skógarvinnu hevur givið úrslit. Men frágreiðingin sigur eisini, at í londum við frumskógi gongur tað framvegis tann skeiva vegin. Hetta er serliga galdandi fyri Brasil og Indonesia, men vísir seg eisini í øðrum londum við frumskógi so sum Nigeria, Kameroun og Demokratiska Lýðveldinum Kongo.

# Skipaeftirlitið tikið skeivar avgerðir

**Maskinmeistarafelagið fingið viðhald í 5 kærumálum**

TÍÐINDASKRIV
*frá Maskinmeistarafelagnum*

Á fundi í Sjóvinnuráðnum tann 6. oktober 2006 vóru m. a. kærur frá Maskinmeistarafelagnum um manningarviðurskifti viðgjørdar.

Felagið fekk í Sjóvinnuráðnum viðhald í 5 kærum.

Í 4 førum hevur Skipaeftirlitið ásett minni førleikakrøv til maskinmanning enn manningalógin ásetir og í 1 føri hevur Skipaeftirlitið av órøttum givið skipum undantaksloyvi til at sigla við óskikkaðum maskinmeistarum.

Maskinmeistarafeagið hevur í fleiri ár víst á, at umsitingin av manningaviðurskiftum als ikki hevur verið nøktandi og landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum er kunnaður um hetta.

Avgerðirnar hjá Sjóvinnuráðnum í hesum 5 málum prógva, at Maskinmeistarafelagið hevur havt rætt í sínum atfinningum og felagið vónar nú, at Skipaeftirlitið og landsstýrismaðurin í sjóvinnumálum fara at endurskoða málsviðgerðina av manningaviðurskiftum.

Sjóvinnuráðið er hægsti myndugleiki í málum viðvíkjandi manningarviðurskiftum og sambært lógini eru tess avgerðir endaligar.